VB/Sumba-B36:

# B36 leitar eftir sigrinum

**B36 hevur ikki vunnið í Vági síðani 1997, og eisini ta ferðina var Sigfríður Clementsen á beinkinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*



Tað tykist vera móti oddaliðunum, at VB stendur seg best. Í øllum førum eru teir báðir sigrarnir hjá liðnum í ár fingnir til høldar móti ávíkavist nummar tvey og trý á stigatalvuni, og nú kemur verandi oddaliðið á vitjan.

Skal metast eftir hagtølunum, so hevur VB eisini góð kort á hondini, tí leitast skal aftur til 1997, um seinasti B36-sigurin skal finnast.

Bjarni Johansen – veteranurin í VB-málinum – tykist ikki leggja so nógv í, hvat hagtølini siga, men hann staðfestir tó, at tað ljóðar gott, um so er.

Um dystin sunnudagin sigur Bjarni, at heir hava allar mans tøkar.

- Nú er so bara eftir at vísa, at vit eisini kunnu spæla væl á heimavølli. Kanska tað kann seta menninar eitt sindur eyka upp, at talan er um oddalið, og í øllum førum er ætlanin at vinna, staðfestir hann.

### Venjarin er hin sami

Á beinkinum hjá B36 verður helst Sigfríður Clementsen, og hann tykist í øllum førum hava góð minni úr Vági. Tá B36 í 1997 vann 2-1 í Vági, var tað nevnliga Sigfríður, sum stýri liðnum stóran part av dystinum. Hetta tí Tomislav Sivic, sum tá var leikandi venjari hjá B36, varð rikin av vølli undan steðginum, og eftir hetta var tað so Sigfríður, sum hjálpti til at stýra monnunum. Eisini taldist Sigfríður millum málskjúttarnar, tá B36 í 1996 vann 3-1, og hóast hann ikki tímir at leggja so nógv í hagtøl, so heldur venjarin, at hetta kanska er ein ábending.

- Tað kann vera, at tað er tað, sum hevur restað í, flennir hann. Men hann er skjótur at leggja afturat, at hagtøl ikki eru meira enn tað sama.

- Dysturin skal í øllum førum spælast, og vit fara eftir stigunum. Seinastu dystirnar hevur talan verið um stóra framgongd í spælinum, og tað vilja vit halda fast um, sigur Sigfríður.

Um manningina til dystin sigur venjarin, at B36 hevur at kalla alt fólkið tókt. Einasta undantakið er Klæmint Matras, sum hevur drigist við skaða. Hann varð tó innskiftur í dystinum móti KÍ, men síðani er skaðin versnaður aftur, og hóskvøldið var støða framvegis ikki tikin til, hvørt hann fór at verða partur av hópinum sunnudagin.

## Dystir um vikuskiftið

**Fótbóltur**
**Formula-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| 01.05 | KÍ-NSÍ | Georg Rasmussen |
| 01.05 | HB-EB/S | Jens P. Brattalíð |
| 01.05 | VB-B36 | Oddmar Andreasen |
| 01.05 | GÍ-Skála | Páll Augustinussen |
| 01.05 | ÍF-TB | Lassin Isaksen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 30.04 | B36-B68 | Petur Reinert |
| 30.04 | Roynd-FSV04 | Ransin N. Djurhuus |
| 30.04 | AB-B71 | Eiler Rasmussen |
| 30.04 | LÍF-Sumba | Regin Egholm |
| 30.04 | GÍ-HB | Rúni Gaardbo |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 01.05 | B68-ÍF | Jan á Líðarenda |
| 01.05 | SÍ-KÍ | Suni Johansen |
| 01.05 | Fram-HB | Andrew Christiansen |
| 01.05 | EB/S-Skála | Dan Højgaard |
| 01.05 | VB-NSÍ | Lars Müller |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 01.05 | GÍ-KÍ | Johnleif Gerðisá |
| 01.05 | B36-EB/S | Andrew Christiansen |
| 01.05 | AB-FSV04 | Eiler Rasmussen |

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 30.04 | Stjørnan-VB | Hannis Wardum & Uni Wardum |

KÍ-NSÍ:

# Báðir partar leingjast eftir fullari úrtøku

**Ivamál eru um onkrar av lyklaspælarunum hjá NSÍ, meðan allir eru tøkir hjá KÍ, har tað kanska kortini fara at verða onkrar broytingar á liðnum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Í Klaksvík verður roynt at leggja ringu minnini frá seinastu vikunum aftur um bak*

Nógv vatn er runnið í ánna, síðani NSÍ fyrstu ferð royndi seg í bestu deildini í Klaksvík. Tað var í 1976, at NSÍ fyrstu ferð var í 1. deild, og teir í NSÍ taka enn til ferðina norðureftir ta ferðina. NSÍ legði seg á odda, men heimaliðið vann 10-1!

Fyrsta ferðin, at NSÍ fekk fulla úrtøku í Klaksvík, var í 2000, tá ið teir vunnu 1-0. Síðani tá hevur tað riðið um snarið, hvørja ferð, tá ið NSÍ hevur verið har norðuri.

Felags fyri báðar partarnar, sum fara á vøllin á Eiðinum í morgin, er, at tey leingjast eftir at fáa fulla úrtøku. Tað hevur NSÍ ikki fingið, síðani teir í fyrsta umfarinum vunnu móti B36 í Gundadali, og tað hevur KÍ ikki fingið, síðani teir í triðja umfarinum vunnu í Gøtu.

Tá ið NSÍ spældi javnt móti ÍF á heimavølli, fóru onkrir av vøllinum orsaka av skaða. Sjúrður Jacobsen hevur verið skaddur í fleiri vikur, og hann verður ikki tøkur aftur fyrrenn um einar tvær vikur. Gert Langgaard noyddist sunnudagin út við vøddaskaða. Hann hevur ikki vant í vikuni, og tað verður ikki mett, at hann verður førur fyri at spæla í morgin. Ike hevur eisini havt trupulleikar, men teir vóna, at hann verður førur fyri at spæla.

Í Klaksvík eru allir spælararnir tøkir. Tað sigur seg sjálvt, at tá ið liðið tvær ferðir á rað hevur lagt rygg til tap — fyrst á heimavølli móti Skála og síðani í Gundadali móti B36 — so verður møguleikin fyri broytingum umhugsaður, men hvørjar møguligu broytingarnar fara at vera, fæst ikki at vita fyrrenn í morgin. Eftir venjingina hóskvøldið ótu KÍ spælararnir døgurða saman, og nú royna Ove Flindt Bjerg og hansara menn at leggja tað farna afturum og at fokusera upp á tað, sum er á skránni í morgin.

# Úrslitini frá firmakappingini

Sum partur av flaggdagsrenningini varð eisini skipað fyri firmakapping. Kappast varð hjá bæði monnum og kvinnum, og vórðu fremstu liðini í kappingini hesi:

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | **Føroya Banki** | |
| | Cecil Weihe | 24.36 |
| | Sigurð B. Justinussen | 24.45 |
| | Regin I. Jakobsen | 27.07 |
| | Bjartur Mortensen | 28.16 |
| | Jan Jakobsen | 29.37 |
| 2 | **Shell 1** | |
| | Arnfinnur Nesá | 27.30 |
| | Hákun Djurhuus | 28.35 |
| | Jón Johansen | 29.57 |
| 3 | **Elektron-1** | |
| | Hanus Højgaard | 27.23 |
| | Hans Petur Weihe | 29.19 |
| | Robert Vilhelmsen | 30.32 |
| | Jógvan Olsen | 31.06 |
| | Pauli Djurholm | 33.08 |

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | **Løgtingið** | |
| | Kristina Samuelsen | 34.47 |
| | Durita Djurholm | 35.06 |
| | Súsanna Danielsen | 36.53 |
| | Birita Samuelsen | 40.35 |
| 2 | **Lab. Sisters** | |
| | Marita Simonsen | 36.10 |
| | Ann Østerø | 36.52 |
| | Nina Djurhuus | 36.52 |
| 3 | **Føroya Tele** | |
| | Birna Abrahamsen | 34.12 |
| | Susan Jacobsen | 37.16 |
| | Maria Jacobsen | 38.56 |
| | Ruth Jacobsen | 39.23 |
| | Marjun Jógvansdóttir | 39.24 |